# Søkt verður eftir pedagogi/-hjálparfólki

**Til Frítíðarskúlan í Runavíkar kommunu**

Frítíðarskúlin heldur til í gomlu læknahúsinum á Heiðavegi 22 Saltangará. Frítíðarskúlin er normeraður til 30 børn.

**Pedagogi 30 t um vikuna**
Starvið er fyri ein pedagog ið fer í barnsburðarfarloyvi frá 10. august 2005 til 30. juni 2006.

**Hjálparfólkið 20 t um vikuna**
Starvið er fyri eitt hjálparfólk ið fer í barnsburðarfarloyvi 10. august 2005 til 30. juni 2006.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- er áhugaður at arbeiða við størri børnum
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur umsorgan og virðing fyri børnunum

Starvið verður sett 10. august ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Lailu Weihe, leiðara, á tlf. 448594 lok. 12 ella tlf. 216630.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. mai. 2005

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

**Heimarøktin og Serforsorgin**
**Serstovnadeildin**
**Sambýli Líknargøta 1**
**620 Runavík**

# Pedagogur

Innan Heimarøktina og Serforsorgina, og stovnum undir tí við fyribilstænastu á Sambýlinum á Líknagøtu 1 í Saltangará, er eitt pedagog starv leyst til setan 1. juni 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar og vikuskiftisarbeiði.

Á Sambýlinum á Líknagøtu búgva 3. ungir menn við autismu. Arbeiðið fevnir um at skipa gerandisdagin og frítíðina saman við teimum og verandi starvsfólkum. Tað krevur m.a., at tú er førur fyri at gera kropsligt arbeiði, ganga túrar, svimja, gera fimleik o.s.fr.

**Løn- og setunartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27,28 og 30 til 33 eftir lønartalvu frá 01.10.04

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið og Bústovnin á Rúnarvegi 3 & 6 í Runavík, ið eru undir somu leiðslu sum Sambýlið á Líknagøtu 1. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Bert umsøkjara, sum hava lokið eina námsfrøðiliga útbúgving verða settir í starv.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2005 kl. 12.00

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121.

Umsóknir skulu stílast til:

**Bústovnin á Rúnarvegi**
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 6
Fo - 620 Runavík

# Maskinmeistari søkist til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna er leyst at søkja til setan frá umleið juni 2005.

**Starvið:**
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Undir Fossáverkinum hoyra eisini Mýru-, Heyga- og Eiðisverkið, sum eins og vatnturbinan á Strond verða stýrd frá Fossáverkinum. Talan er um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat við einum samlaðum mátti upp á 28,4 MW. Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling). Eisini er vakthavandi á Fossá-verkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært 5. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.

Byrjunar- og endalønin í 5. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 23.234,37 og kr. 24.926,19 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 2.904,30 og kr. 3.115,77 um mánaðin.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi hósdagin, tann 19. mai 2005.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Pól Joensen, verksmeistara á Fossáverkinum ella til Bjarka Hermansen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

**Tórshavn, tann 2. mai 2005.**

**Elfelagið** SEV

**Størv**

# Frítíðaravloysarar



Við hesum verður søkt eftir frítíðaravloysarum, sum lastbilførarar/farmastøðsfólk til Farmastøðirnar kring landið, summarið 2005.

Freistin at søkja størvini er tann 23. mai 2005.
Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

# Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Borðtennissamband Føroya verður fríggjakvøldið 20. mai 2005 kl. 19.00 í ÍSF-húsinum.

**Borðtennissamband Føroya**

# Søkt verður eftir tænara/servitrisu

til hugnaligu matstovu okkara at byrja skjótast gjørligt

Vinaliga ring 213430 ella 313430
Marco Polo

# Ársaðalfundur

Neistans verður mikudagin 25. mars kl. 19.00 í Neistahølunum.

**Neistin**

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480